Hús til sølu | Bátur til sølu | Lýsing

# Virkisbygningur á havnalagnum í Kollafirði til sølu



Hesin bygningurin verður seldur um nøktandi boð fæst!

- **Stað:** Kollafjørður
- **Gólvvídd:** 1600 $m^2$

Áhugaði kunnu venda sær til heimasíðu okkara:

- **Heimasíða:** www.rannteld.com

har nærri upplýsingar um prís o.a. fáast.



bókhaldsvirkið Rann Teld

Bókhald
Fakturering
Skuldararøkt
Ognararøkt
MVG-uppgerðir
Skattauppgerðir
Rakstrarætlan
Fyrisiting
Lønar og hýruavrokningar
Ársroknskapir

tlf. 31 89 03 - fax 31 87 03 - M. Heinasonargøta 23 - postboks 205 - 110 Tórshavn

DEKOPRINT




## Mánadag til fríggjadag, 15. – 19. oktober, kl. 11.00 – 16.00

Hugtakandi upplivingar og stuttligar uppgávur til børn og vaksin. Leitið eftir plantum og steinum! Leitið eftir skriðkyktum, fiskum, krabbum og krossfiskum! Summi hava enntá fjalt seg úti í grasinum ella uppi í trøunum. Kanska ert tú heppin og finnur eiturkoppin ella klukkuna, sum hava fjalt seg á heystfagnaðinum. Um tú torir!

Heystfagnaðurin er felags átak hjá Jarðfeingi, nýggju Umhvørvisstovuni og Sjósavninum.

**Opið er mánadag til fríggjadag 15. – 19. oktober, kl. 11.00 – 16:00**
Náttúrugripasavnið (Umhvørvisstovan) ókeypis atgongd
Sjósavnið 30 kr fyri vaksin og 15 kr fyri børn

(Hesir prísir eru bert galdandi í døgunum 15. – 19.oktober)

JARÐFEINGI
FAROESE EARTH AND ENERGY DIRECTORATE



# KT-FÓLK
## TIL FØROYA DÁTUSAVN

**Føroya Dátusavn søkir eftir fólki at byrja 15. okt. 2007 ella skjótast gjørligt**

Arbeiðið fevnir um FO-umsitingina, sum er tænasta, ið Føroya Dátusavn røkir fyri FO-ráðið. Uppgávurnar eru at viðgera og avgreiða umsóknir um FO-økisnøvn á internetinum, ráðgeving o.a.

Vælkenda nettænastan kagi.fo er partur av kort- og lendislýsingararbeiði okkara, sum er kjarnin í virkseminum. Vit rokna við, at tú eisini fert at luttaka í hesum arbeiði.

Ikki sørt av tøkni er knýtt at arbeiðsøkjum okkara, og tí skalt tú vera ein góður allroundari, sum kann taka sær av tøkniligum uppgávum og avbjóðingum, men eisini av vanligum skrivstovuarbeiði.

Skriva nøkur orð um teg sjálvan og send tey til Føroya Dátusavn, Tinghúsvegur 9, 100 Tórshavn áðrenn 15. oktober 2007. Ivast tú í onkrum, ring so til okkara á 316200 / 216201 ella støkk inn á gólvið og spyr eftir Peturi.

Føroya Dátusavn

REPROZ

# »Lívið sum handverkari«



Lívið sum handverkari er heitið á fyrilestri, sum Bettina Andersen fer at halda í hølum Starvsmannafelagsins J. H. Schrøtersgøta 9, Tórshavn. Bettina Andersen greiðir frá og vísir myndir, um hvussu lív hennara er merkt av, at handverk er bæði hennara ítriv og vinnuvegur.

**Fyrilesturin verður 17. oktober kl. 19.30, ókeypis atgongd.**

Meira um Bettinu Andersen fæst at vita á www.bettinaandersen,dk og á www.husflid.dk



**Føroya Heimavirkisfelag**